ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 24. september 2009

# TB aftur á uppflytarakós

**VB/Sumba fekk tveir mans riknar av vøllinum og TB misti ein, tá TB í gjárkvøldið fór úr Vági við trimum stigum. TB heldur tí fast um kósina í uppflytingarstríðnum, sum nú er munandi hert**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Tað gekk hart fyri seg, tá VB/Sumba og TB í gjárkvøldið spældu granna- og toppuppgerð í 1. deild hjá monnum.

Við einum sigri hevði VB/Sumba møguleika at staðfesta sína støðu sum uppflytari, meðan TB hinvegin hevði alstóran tørv á teimum trimum stigunum, um teir skuldu halda fast um sína kós í uppflytingarstríðnum.

Tað var heimaliðið, sum fekk betri byrjanina, og eftir bar sjey minutt-um høvdu teir eisini lagt seg á odda við einum máli frá Jón Krosslá Poulsen.

Tann støðan helt sær til steðgin, men so gekk heilt galið. Tíðliga í seinna hálvleiki fekk TB brotsspark, sum Bassena sendi í kassan, og tá VB/Sumba samstundis fekk mann riknan av velli, gjørdist trýstið móti heimaliðnum stórt. Bara 12 minuttir seinni varð aftur brotsspark, og enn einaferð var Bassena tryggur skjútti.

Eftir hetta leikaði hart á báðar vegir, og í hitanum, sum var á vøllinum, tó at veðrið ikki var tað lýggjasta, fingu liðini hvør sín mann riknan av vølli, soleiðis at manntalið – umframt dómaratríbólkin – bert taldi 19, tá dysturin var av.

Á Sandi hevði B71 ikki stórvegis trupulleikar við at basa botn-proppinum, MB, og nú bendir alt á sera tætta kapprenning seinastu tvey umførini av 1. deild.



Tað gekk hart fyri seg á Eiðinum í Vági, men við trimum stigum hongur TB framvegis væl við í uppflytingarstríðnum

Mynd: Dagfinn Olsen

## FAKTA

**B71-MB 5-1 (1-1)**
**1-0:** Clayton Soares
**1-1:** Jack Johansen
**2-1:** Guðbjörn A. Sæmundsson
**3-1:** Guðbjörn A. Sæmundsson
**4-1:** Símin Hansen
**5-1:** Jónsvein Thomsen

**Skála-Víkingur 0-0**

**VB/Sumba-TB 1-2 (1-0)**
**1-0:** Jón Krosslá Poulsen
**1-1:** Josef Bassene br.sp.
**1-2:** Josef Bassene br.sp.
**Reyð kort:**
Henning Joensen, VB/Sumba, Karl Lisberg, VB/Sumba, Heini Mortensen, TB

**FC Hoyvík-NSÍ 0-3 (0-0)**
**0-1:** Eddie Mikkelsen
**0-2:** Sonni L. Petersen
**0-3:** Karl Løkin

**HB-B68 2-2 (1-1)**
**0-1:** Jónreid Dalheim
**1-1:** Óli Restorff Hansen
**2-1:** Jákup Slættalíð

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB/S | 25 | 14 | - | 6 | - | 5 | 60 | 40 | 20 | 48 |
| 2 B71 | 25 | 13 | - | 7 | - | 5 | 56 | 35 | 21 | 46 |
| 3 HB | 25 | 13 | - | 6 | - | 6 | 55 | 35 | 20 | 45 |
| 4 TB | 25 | 13 | - | 5 | - | 7 | 53 | 43 | 10 | 44 |
| 5 B68 | 25 | 10 | - | 6 | - | 9 | 61 | 49 | 12 | 36 |
| 6 NSÍ | 25 | 9 | - | 6 | - | 10 | 44 | 49 | -5 | 33 |
| 7 Víkingur | 25 | 7 | - | 10 | - | 8 | 38 | 35 | 3 | 31 |
| 8 Skála | 25 | 8 | - | 5 | - | 12 | 36 | 38 | -2 | 29 |
| 9 FC Hoyvík | 25 | 9 | - | 1 | - | 15 | 31 | 53 | -22 | 28 |
| 10 MB | 25 | 2 | - | 2 | - | 21 | 27 | 84 | -57 | 8 |

NOMINERINGAR:
Ársins stjørnuskot:
Vodafonedeildin og
1. Deild kvinnur
Ársins leikari:
Vodafonedeildin og
1. Deild kvinnur
Ársins málverji:
Vodafonedeildin og
1. Deild kvinnur
Ársins venjari:
Vodafonedeildin og
1. deild kvinnur
Ársins dómari

ÁRSINS FÓTBÓLTSVEITSLA
í Bowlinghøllini sunnukvøldið 4. oktober

Sosialurin og Rás2 skipa fyri ársins fótbóltsveitslu. Allir leikarir í Vodafonedeildini, 1. Deild kvinnur, nevndarlimir, venjarar og hjálparfólk og dómarar eru boðin við og kunnu tekna seg til veistluna, við at senda ein teldupost til: fotboltsveitsla@sosialurin.fo innan mikudagin 1. oktober. Navn og eftirnavn skal viðmerkjast í teldupostinum. Frá kl 19.00 verður ókeypis buffet, men ein má gjalda fyri drykkivørurnar

Tekna teg til veitsluna við at senda ein teldupost til:
fotboltsveitsla@sosialurin.fo innan 1.oktober

SKRÁ
Dyrnar í Bowlinghøllini lata upp kl. 19.00
Vinnararnir verða kunngjørdir kl. 20.00
Tónleikur og hugni

Sosialurin